## Harmast ísraelska bygging

Tað hevur elvt til misnøgd og vreiði víða um heimin, at ísraelsku myndugleikarnir hava gjørt av at byggja 900 íbúðir í Eysturjerusalem, sum er eitt av teimum hersettu økjunum, sum ísraelsmenn og palestinar stríðast um. Ian Kelly, sum er talsmaður hjá Hvítu Húsunum, sigur, at USA hevur fleiri ferðir mótmælt, at Ísrael setir nýggjar byggiætlanir í verk í teimum hersettu økjunum, og at amerikanska stjórnin hevur eisini mótmælt teirri nýggju avgerðini. Samráðingarleiðarin hjá palestinum, Saeb Erekat, sigur við Reuters, at verður byggingin framd, er einki grundarlag fyri friðarsamráðingum longur.



## Ongar stórar flatskíggjar

Myndugleikarnir í amerikanska statinum Kalifornia samtyktu í gjár at banna fólki at brúka stórar flatskíggjar, sum brúka ov nógva orku. Tey, sum taka undir við lógini, siga, at fólk fara at spara streym fyri einar átta milliardir dollarar um árið, sum svarar til orkutørvin hjá umleið 800.000 húsum og íbúðum. Lógin sigur, at flatskíggjar, sum skulu seljast í Kalifornia frá 2011, skulu brúka minst 33 prosent minni streym enn teir, sum verða seldir í dag, og at teir, sum verða seldir aftan á 2013, skulu brúka minst 50 prosent minni streym. Eygleiðarar siga, at lógin í Kalifornia kann fáa ávirkan á alla sjónvarpsframleiðslu kring heimin.




*Síðani Smyril varð settur í sigling, hevur hann havt black out seks ferðir, umframt at hann hevur havt ein annan tekniskan trupulleika. Trupulleikin verður ikki endaliga loystur, fyrrenn hann fer í dokk, men enn er óvist nær tað verður*

# Óvist nær trupulleikin við Smyrli er endaliga loystur

**Enn er óvist nær tað eydnast at fáa endaliga bilbukt við trupulleikunum, sum hevur ført við sær, at Smyril nakrar ferðir hevur mist maskinorkuna. Landsstýrismaðurin vil helst hava trupulleikan loystan næsta ár, men hann veit ikki um hann fær fíggjarliga játtan til endamálið**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn er tað ongin, sum dugur at siga við vissu, nær trupulleikin, har Smyril nakrar ferðir meiri ella minni er uppsteðgaður, verður endaliga loystur.

Jaspur Vang, løgtingsmaður, hevur spurt Johan Dahl, hvat hann ætlar at gera við trupulleikan at Smyril fær tað, sum tey kalla blackout

Johan Dahl staðfestir, at hann kann ikki veita vissu fyri, at Smyril ikki fær blackout aftur. Men hann vissar um, at arbeitt verður miðvíst við, at Smyril ikki skal steðga av somu brekum aftur.

- Eitt nú er øll 24 volt skipanin útskift og umløgd. Strandfaraskip Landsins er eisini í ferð við at montera eina back-up skipan (UPS) til høvuðsmotorarnar, soleiðis at høvuðsmotorarnir ikki skulu steðga, sjálvt um Smyril fær blackout. Henda skipanin ger, at Smyril kann sigla upp á neyðkraft, skuldi hann aftur fingið blackout.

- Harumframt er Strandferðslan í ferð við at skifta PMS skipanina á Smyrli út við eina tryggari skipan. Væntandi fer hendan nýggja skipanin at minka nógv um vandan fyri blackout og um teir vansar, ið kunnu standast av einum møguligum blackout.

Men landsstýrismaðurin staðfestir, at hetta arbeiðið er rættiliga umfatandi, og verður tað gjørt, meðan siglt verður.

- Arbeiðið skal gerast liðugt, næstu ferð Smyril fer í dokk. Á uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 2010 er einki avsett til dokking av Smyrli, tí ætlanin er, at hann skal í dokk í 2011 og tískil verður neyðugt at fara undir eina vetrarsigling afturat, uttan at PMS-skipanin er skift.

- Um so er, at Smyrli verður dokkaður á heysti í 2010, ber til at fara undir sigling í vetrarhálvuni 2010/11 við minst møguligum vanda fyri blackout á Smyrli. Hetta krevur tó, at hædd verður tikin fyri dokkingini av Smyrli á løgtingsfíggjarlógini fyri 2010.

Johan Dahl sigur, at hann heldur tað er umráðandi, at tað ber til at dokka Smyril í 2010, so PMS-skipanin kann verða liðugt installerað.

Hann upplýsir eisini, at ímeðan nýggja PMS verður ísett, siglir Smyril nú altíð við trimum hjálparmotorum inni á talvuni í einari roynd at sleppa undan blackoutum.

- Hóast henda loysn ger elveitingina tryggari, so er hetta ein dýr loysn bæði í olju, viðlíkahaldi og eykalutum, sigur hann.

## Rætta brekini so hvørt

Vanliga nýtist eitt blackout ikki at merkja, at eitt skip ikki er ført fyri at manøvrera, tí høvuðsmotorar, róður og aðrar týdningarmiklar funktiónir kunnu framvegis verða virkin.

Tað staðfestir Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum í svari sínum til Jaspur Vang, løgtingsmann, sum hevur spurt hann, hvat hvørja støðu hann hevur til, at Smyrli av og á liggur meiri ella minni uppsteðgaður.

Johan Dahl sigur, at somuleiðis er ein neyðskipan sum tryggjar, at elveitingin aftur verður til tey mest týdningarmiklu tólini umborð. Harafturat er ein 24 volt skipan umborð sum tryggjar, at skipið kann manøvrera og sigla við niðursettari ferð, meðan høvuðselveitingin ikki er virkin.

- Innan 10-40 sekund skal neyðgeneratorurin vera startaður, og partur av elveitingin vera tøk. Eftir hetta kunnu so tey ymsu tólini aftur setast í gongd soleiðis, at skipið aftur kann manøvra við fullari kraft, og tekur hettar vanliga millum 5 og 10 minuttir.

Johan Dahl sigur, at síðani Smyril varð settur í sigling, hevur hann havt seks blackout, umframt ein annan tekniskan trupulleika.

Tvær ferður lá hann við bryggju og fýra ferðir var hann í sigling. Og so hvørt, sum brek eru funnin, eru tey rættað, so at tey ikki henda aftur.